# Stimbrandi eldratilboð í Yndifitness

**- Tað er ongantíð ov seint at røkja sín kropp, sigur Elsa Maria Bærentsen, instruktørur og annar stjórin í Yndifitness yviri við Strond í Havn. Yndi hevur eitt spennandi, kveikjandi tilboð til tey eldru: Fitness í Yndi**



*Ása Hátún og Jógvan Andreasen gera seg klár at fara í holt við rennibandið*

– Hetta er óført! Her er ymisk venjing, renniband, motiónssúkkla og ein hópur av maskinum, sigur Jógvan Andreassen, fyrrverandi dómari.

Jógvan Andreassen er sera fegin um hetta nýggja tilboðið til pensjónistar í Yndifitness í november. Og øll, ið hava roynt tilboðið higartil, eru himmalfegin: - Kom við, sigur Ása Hátún, eftirløntur lærari.

Ætlanin hjá Yndifitness er so at bjóða teimum eldru sama tilboð aftur í januar.

## Nógv burturúr

– Tey, sum hava gingið her henda royndarmánaðin í november, eru glað fyri tað, tey hava fingið burturúr, sigur Elsa Maria Bærentsen, instruktørur.

Elsa Maria sigur, at tey byrja aftur 5. januar og halda fram í átta vikur. Tey, ið taka av tilboðnum frá Yndi, gjalda 700 krónur.

– Vit hava skipað soleiðis fyri, at vit fylgja við teimum alla tíðina. Vit hava tey undir observatión og rætta uppá tey, um neyðugt. Og tað er tað sjálvandi.

Elsa Maria heldur, at tey eldru ella pensjónistarnir eru væl nøgd. Ið hvussu er lata tey væl at.

## Aktivering

Elsa Maria sigur, at tankin við øllum var upprunaliga, at mamma hennara, ið nú er ein eldri dama, gekk á Tjarnargarði í samband við eitt tilboð haðani, sum kommunan og landið høvdu fingið í lag um at aktivera tey eldru.

– Eg sá, hvussu hon tók seg fram. Tað er eitt gott tilboð, men tað røkkur ov stutt. Mamma helt uppat, og so verður tað ikki hildið við líka.

Tankin hjá Elsu Mariu við tilboðnum í Yndi er tískil, at kanska verða tey vand upp á Tjarnargarði og kunnu so fara oman í Yndi at halda seg sjálv við líka. Upplatingartíðirnar hjá Yndi eru sera hóskiligar, og tey eldru skulu í øllum føri hava høvi til at venja í Yndi minst tvær ferðir um vikuna, tveir tímar í senn frá klokkan 9 til 11 mikudag og fríggjadag.

– Tankin er, at tey eldru kunnu koma higar og røkja seg sjálv, so tey kunnu liva eitt virðiligt lív. Og tær nýtist ikki at vera pensjónistur, men eg leggi dent á, at tað er ongantíð ov seint at íðka, sigur Elsa Maria Bærentsen í Yndifitness.

















